## Ronaldo hugsar ikki um Real

Áhaldandi søgur hava sett Cristiano Ronaldo í samband við Real Madrid, og í fjør var eftir øllum at døma nær við, at Ronaldo fór úr Manchester United og til Real Madrid. Men Ronaldo segði í gjár við Sunday Mirror, at hann ætlar sær ikki til Real Madrid at spæla. - Hasin dreymurin er deyður. Nú droymi eg bara um Manchester United og um vinna Champions League við liðnum, sigur Ronaldo.



## Ramos viðurkennir yvirmaktina

Barcelona setti um vikuskiftið Real Madrid so dyggiliga upp á pláss í sponsku fótbóltskappingini, og venjarin hjá Real Madrid viðurkennir, at hansara lið megnar ikki at taka Barcelona í ár. - Barcelona er á einum hægri stigi enn vit. Vit vóru noyddir at satsa, eftir at vit vóru komnir afturum, og tað hevði so við sær, at vit taptu so nógv, sigur Ramos. Dysturin endaði við 6-2 sigri til Barcelona.

NSÍ-B68 2-2 (0-1):

# Grannarnir semjast væl

*NSÍ*

*B68*

**B68 vísti seg at spæla upp til oddaliðið og favorittarnar úr Runavík, sum vóru bæði undir og omaná, og í evstu løtu vóru um reppið at missa øll stigini**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Toftamenn vóru undirtippaðir, men tað eydnaðist teimum kortini at toga eitt stig við sær um Svangaskarð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er so mangt, sum ikki er, sum tað hevur verið. Søgur vilja vera við, at tað var ikki við mýkindum, tá ið toftamenn og innanmenn fyrstu árini tókust í fótbólti – bæði á og kring vøllin!

At tað eisini er nógv broytt í grannauppgerðini á eystara armi á Skálafjørðinum varð undirstrikað, tá ið NSÍ í gjár hevði vitjan av B68. Tað var polerað og friðarligt, og serliga í 1. hálvleiki bar tað heilt lítið brá av grannauppgerð. Í teimum plaga tað eitt nú at vera tættar eftiransingar, eirindarleyst stríð í nærdystunum og kapprenning eisini um teir bóltarnar, sum tað tykist vónleyst at fáa fatur á.

Orsøkirnar til broytingina munnu vera fleiri. Inntil fyri ikki so ógvuliga nógvum árum síðani vóru bygdirnar meiri ella minni avmarkað samfeløg, sum so at siga livdu av sær sjálvum, og sum ikki høvdu so nógv brúk fyri grannunum ella ofta rættari: sum ikki høvdu hug at samstarva so nógv við grannarnar, ið jú eisini vóru argastu kappingarneytarnir á so mongum økjum.

Nú er øðrvísi. Manningarnar í grannauppgerðini við Løkin vóru undirstriking av, hvussu nógv og væl samantvinnaðar relatiónirnar eru á so nógvum økjum. Á báðum liðunum vóru spælarar, sum áður hava roynt seg á mótstøðuliðnum, á báðum liðunum vóru spælarar, sum áður hava verið liðfelagar í øðrum felag (Skála), og so eru tað fleiri, sum hava verið ella eru arbeiðsfelagar ella skúlafelagar.

Sjálvandi verður ikki hugsað so nógv um sovorðið, tá ið spælararnir standa andlit til andlit á vøllinum, men kortini hevur hetta ávirkan á, hvussu leikur fer fram.

### Ikki tyndgir

Sum gongdin hevur verið tey fyrstu umførini, so kundi ikki roknast við øðrum, enn at heimaliðið var favorittur. Men serliga í 1. hálvleiki tóktist tað torført hjá Jan Inga Petersen, sum inntil hetta kappingarárið bara hevði umboðað barndómsfelagið á Svangaskarði, og gulu liðfelagar hansara at framala flótandi samanspælið, sum seinastu vikurnar hevur borið NSÍ fram á oddaplássið.

Bara eina ferð var tað í 1. hálvleiki um reppið, at heimaliðið fekk mál. Stutt undan steðginum var toppskjúttin Karoly Potemkin, sum annars hevði verið rættuliga væl innpakkaður, spældur leysur í brotsteiginum, men Vlada Filipovic í B68 málinum var árvakin.

Toftamenn tóktust á ongan hátt tyngdir av, at grannarnir, sum teir hesa ferð vitjaðu, høvdu fingið so mikið góða úrtøku burtur úr fýra teimum fyrstu umførunum, at teir vóru oddalið.

Í yvirtíðini í 1. hálvleiki legði B68 seg á odda. Øssur Hansen vísti fleiri ferðir í deyðbóltsstøðum góða bóltførleikan, og hesa ferð var miðvallarin Ndende hægstur, tá ið hann við høvdinum stýrdi bóltin í málið.

Fyrra partin av 2. hálvleiki skrúvaði NSÍ ferðina upp, og tá ið tað restaðu tjúgu minuttir høvdu teir skorað tvey mál, og harvið tóktust teir vera á sigurskós og harvið á veg ímóti fullari úrtøku og styrktum oddasessi.

Í fyrra førinum skoraði Karoly Potemkin, tá ið hann var fyrstur á, eftir at Vlada Filipovic hevði roynt at beina innleggi frá Boga Løkin burtur.

Í seinna førinum vóru hesir báðir – Bogi Løkin og Karoly Potemkin – við í uppspælinum, sum endaði við, at miðvallarin Jústinus R. Hansen, sum var á veg ímóti útskifting, við fínum skoti sendi bóltin í málið. Tað bar við sær, at hann fekk høvi at vera eina løtu eyka á vøllinum.

NSÍ leiðslan var avleiðing av yvirvág, men toftamenn megnaðu at koma aftur í aftur. Bill Jacobsen framdi tvær skjótar útskiftingar, og B68 bæði stríddi og spældi seg til eitt stig. Innskifti Óli Olsen, sum hevur lítlar og ongar royndir í bestu deildini, var púra óimponeraður, og hann vísti seg at hava gott máltev. Fyrst javnaði hann til 2-2, tá ið hann var fyrstur á returbólti, eftir at fyrrverandi NSÍ spælarin ,Debus Danielsen, hevði roynt seg úr høgru, og Meinhard Joensen hevði hálvbjargað.

Og so var tað um reppið, at Óli Olsen í evstu løtu skoraði sigursmálið, men á sjálvari málstrikuni varð bólturin steðgaður, og harvið samdust grannarnir um eitt stig í part.

## Helgi Dam Ziska tryggur Grand Prix Vinnari 2009

**IM Helgi Dam Ziska gjørdist sera tryggur Grand Prix vinnari í talvi 2008/09**

TALV
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Hetta varð staðfest í Grand Prix Finaluni í dag, tá 10. og seinasta Grand Prix kappingin í hesum umfarinum varð telvað í hølum Havnar Telvingarfelags.

Kappingin er skipað soleiðis, at 5 tær bestu kappingarnar verða taldar saman til tess at finna samlaða vinnaran.

Tá drigið varð samanum, var Helgi eirindaleysur - vann dagsins kapping - og vann samlaðu kappingina við heili 34 Grand Prix stigum, eittans stig frá fullum stigatali. Talan gjørdist um samanlagt 4 sigrar og eitt deilt 1. pláss, sæð yvir 5 tær bestu kappingarnar.

Kappingin var sera hørð um 2. og 3. plássið. Finalan var avgerandi fyri, hvørt tað gjørdist Finnbjørn Vang ella John Rødgaard sum vunnu 2. plássið í kappingini. Hóast enn ein javnleik í móti Helga í grand prix høpi, snávaði Finnbjørn í hesi orrustuni, tá feðgarnir úr Sandavági, Torkil Nielsen og Rógvi E. Nielsen, steðgaðu jaligu gongdini. IM John Rødgaard gjørdist harvið nr. 2 - eitt úrslit av einari sera góðari Grand Prix orrustu 2008/09.

**Grand Prix endastøða (5 tær bestu kappingarnar av 10):**

IM Helgi Dam Ziska
34,0 GP
IM John Rødgaard
25,5
Finnbjørn Vang
24,2
Rógvi E. Nielsen
23,7
Torkil Nielsen
20,3